

*Fólkini í Tutl. Aftast frá vinstru: Sólarn Solmunde (nevndarlimur), Kristian Blak (dagligur leiðari), Hergeir Eldevig (konsulent), Elin Hentze (konsulent), Ólavur Olsen (nevndarlimur), Annleyg Lamhauge (konsulent), Bogi Eliasen og Gert Bjerg Sørensen*

# Tutl gjørt slóðbrótandi avtalu

**Tutl hevur júst gjørt avtalu við danska felagið Implementer um samstarv. Implementer er eitt konsulentfelag, og samstarvið millum Tutl og Implementer skal vera við til at fáa Tutl út í heim**

TÓNLEIKUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

– Hetta er ein góður møguleiki at fáa felagið skipað. Hetta gevur nýggjar møguleikar fyri felagið, sigur Sólarn Solmunde, sum er nevndarlimur í Tutl.

- Tutl hevur mest sum staðið í stað síðstu tíðina. Virksemið er nógv økt, mn umsitingin er als ikki broytt. Tað er avmarkað, hvussu nógv fólk klára í teirra frítíð, sigur Ólavur Olsen, sum eisini er nevndarlimur í Tutl.

Tað eru nýggjar avbjóðingar, sum standa fyri framman hjá Tutl, og tí kenna teir seg noyddar at royna okkurt nýtt.

- Tónleikalívið í Føroyum er eksploderað síðstu árini. Nýggju tíðirnar krevja nýtonking. Vit hava downloads og annað, sum Tutl má fylgja við í, sigur Sólarn.

- Á síðsta aðalfundi tosaði vit um, at Tutl mátti koma víðari. Vit komu síðani í samband við Implementer, og teir hava víst sera stóran áhuga í okkara felag, sigur Ólavur.

Implementer er eitt danska "konsulenthús" við skrivstovu í Keypmannahavn. Har arbeiða 6 fólk til dagligt.

- Vit síggja stórar møguleikar í Tutl. Eg vil kalla Tutl fyri eitt gullegg í føroyskari mentan. Vit fara at hjálpa til at "branda" Tutl betri, sigur Gert Bjerg Sørensen frá Implementer.

Danski konsulenturin heldur veruliga, at tað eru stórir møguleikar við Tutl.

- Tutl hevur eina sál. Tað er eitt serstakt felag við einum samleika. Við vilja gjarna hjálpa til at fáa hetta út til restina av heiminum. Allur heimurin skal vita um, hvørjir fyrimunir eru við at hava Tutl sum plátufelag, sigur Gert.

Sólarn, Ólavur og Gert virðismeta allir tað stóra arbeiðið, sum Kristian Blak hevur lagt í plátufelagið Tutl. Kristian er dagligur leiðari av Tutl og er veruiga ímyndin av felagnum.

- Kristian hevur heilt vist verið primus-motor. Men tað er avmarkað, hvussu nógv tú kanst gera ólønt, sigur Gert.

- Nú vilja vit fegin dagføra Tutl, so at tað gerst ein fyritøka. Málið er at fáa starvsfólk at starvast fulla tíð. Tað skulu eisini vera fleiri enn eitt starvsfólk, sigur Ólavur.

- Tutl skal tó halda fram við hugsjónini, hóast tað gerst meira vinnurekandi. Vit vilja varðveita sálina í felagnum, sigur Gert.

Teir eru ikki í iva um, at Tutl verður ein succés uttanlands.

- Føroyskur tónleikur er heilt ótrúligur. Við Tutl hava tit teir bestu karmarnar at menna hann víðari. Um Tutl verður kent, kemur hetta sjálvandi eisini at dryppa á føroyska samfelagið. Tey stóru tónleikanøvnini eru eisini við til at marknaðarføra sítt egna heimland, sigur Gert.

- Tað er ikki sum við fótbóltslandsliðnum. Teir bara tapa, men í tónleiki kanst tú ikki tapa, sigur Sólarn skemtandi.

Teir eru allir sera spentir uppá hesa altjóðagerðingina av Tutl. Teir vænta at vera lidnir í januar, og so kunnu vit vænta okkum, at okkurt fer at henda innan føroyska tónleikaheimin. Væntandi fara vit at hoyra meira frá Tutl í nærmastu framtíð.

MÁLARALÆRLINGAR

Vit sóknast eftir tveimum fólkum, ið hava hug at útbúgva seg til bygningsmálara.

**Vit vænta:**
At tú ert arbeiðssom/samur, álítandi og hugagóð/ur til hetta arbeiði.

Skrivlig umsókn ynskist.

Málarameistarin Uni Zachariasen

*Vit eru eitt virki málarafirma og í løtuni arbeiða 12 fólk hjá okkum*

Uni Zachariasen, Djúpagilsvegur 44, FO-188 Hoyvík, tlf. 319299